## Krung aftur í sølubúðunum

TÍÐINDASKRIV

Kristiliga Ungmannablaðið, Krung, er aftur at fáa í sølubúðunum. Hetta er á øðrum sinni í ár, at blaðið verður útgivið. Í blaðnum er millum annað møguleiki fyri at lesa um LPK 2004, skótahjálpina og Ælabogan á konsertferð. Tað er KFUM, sum gevur Krung út, og blaðið kostar 20 krónur í sølubúðunum.

## Tráðurin tikin uppaftur

Føroya Tele hevur júst lati enn eina útgávu av blaðnum, Tráðurin, úr hondum. Í blaðnum hesaferð ber til at lesa um fótbóltsspælaran, Toda Jónsson, systkini Honnu og Jóa, sum hava arbeitt 100 ár tilsamans á Føroya Tele. Eisini er greinar við Vígdis Finnbogadóttir og sangfuglinum í Klaksvík, Arnfríð Lützen.

## Næminga-konsert í Klaksvík

Fríggjakvøldið 19. nov verður ein konsert í Býráðshøllini við næmingum frá Klaksvíkar Tónlistarskúla. Konsertin er í sambandi við royndir, sum verða hildnar í næstu viku á tónlistarskúlanum og skulu næmingarnir spæla ein part av programminum á hesi konsertini. Tey, sum spæla, eru Eirikur Biskopstø, violin, Maiken Bringsberg, violin, Kristín Gerðalíð, viola, Marta Hansen, klaver og trombone, Sólgerð Færø, tvørfloyta, Sofía L. Rasmussen, kornet, Ólavur Mortensen, kornet, Amanda H. Askham, horn, Tummas Eli Bjartalíð, kornet og Martin Heimistovu, euphonium.

Konsertin byrjar kl. 19.00 og øll eru vælkomin.

Møllehave í Christianskirkjuni:

# Aldurin broytist – við aldrinum

**- Johannes Møllehave er altíð ahugaverdur at lurta eftir, og so er hann avgjørt ein góð fyrimynd hjá okkum eldru, siga tey í Áhugabólkinum fyri eldri í Klaksvík, nú tey høvdu vitjan av kenda danska prestinum**

FYRILESTUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Áhugabólkurin fyri eldri í Klaksvík saman við Johannes Møllehave*

**Klaksvík:** Rættiliga nógv fólk høvdu leitað sær í Christianskirkjuna mikudagin at lurta eftir kenda prestinum og fyrilestrahaldaranum Johannes Møllehave, sum vitjar í Føroyum í løtuni. Tað var Áhugabólkurin fyri eldri í Klaksvík, sum hevði tikið stig til at fáa Møllehave til Klaksvíkar. Í samráð við Niels Paula Danielsen, sóknarprest, varð gjørt av at hava tiltakið í Christianskirkjuni, fyri at so nógv fólk, sum gjørligt, skuldu fáa høvi at hoyra fyrilesturin.

### Grasið er ikki grønari …

– Johannes Møllehave er jú altíð áhugaverdur at lurta eftir hjá øllum. Og við síni lívsgleði og ótrúligu lívsmegi hóast sjúku og mótgang er hann avgjørt eisini ein fyrimynd fyri okkum eldri, sigur Maria Klein, limur í Áhugabólkinum.

Hóast tiltakið mikudagin var fyri øll, fingu tey eldru sítt serliga pláss í hugleiðingunum hjá Møllehave. Við støði í ævnintýrunum hjá H.C. Andersen var boðskapurin, at uttan mun til hvar tú ert, og hvussu gamal tú ert, ræður tað um duga at síggja løtuna beint nú, sum tað bestu í lívinum. Um ikki, kanst tú enda sum summarfuglurin, sum var farin á fríggjaraferð, men endaði sínar dagar sum gamal drongur á eini knappanál í einum sýnisglugga, tí grasið altíð var grønari á hinari síðuni.

Nógv betur gekk tað hørblómuni, sum altíð var so frálíka væl nøgd, bæði tá hon var plantað, undirklæði, pappír, og tá hon til endan fór upp í royk. Og lukkutíð eru vit, sambært Møllehave, soleiðis skrúvað saman, at okkara fatan av aldrinum, altíð broytist við aldrinum.

Sjálvur er Johannes Møllehave nokk besta prógvið um, at aldurin ikki nýtist at hava nakran týdning – í øllum førum ikki fyri, um tú kanst halda ein óvanliga undirhaldandi og lívligan fyrilestur í meir enn ein tíma út í eitt.

# Stórfingið show í Mentanarhúsinum

**Magni Christiansen lovar eitt stórfingið show við hópin av tónleikarum og sangarum á pallinum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði nú sunnukvøldið**

COUNTRY/GOSPEL KONSERT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fuglafjørður: – Tað verður okkurt fyri øll og bæði fyri oyruni og eyguni, lovar Magni Christiansen, sum fer á pallin í Mentanarhúsinum komandi sunnukvøld saman við 11 øðrum tónleikarum og sangarum. Tað er Fuglafjarðar Svimjifelag, sum skipar fyri Country og Gospel kvøldinum, og Magni avdúkar, at áhoyrarnir eisini sleppa at hoyra nøkur av okkara gomlu, vøkru jólaløgum í nýggjum country búna.

### Betri enn nakrantíð

Konsertin við Magna og øllum hinum verður ein blandingur av nýggjum og gomlum country- og gospel løgum. Ì besta Country og Western stíli og ektaðum Cowboyhatti setur Magni nøsina upp ímóti at hava sína bestu framførslu higartil.

– Tað geri eg altíð. Eg elski at undirhalda og gangi høgt upp í, at bæði eg og hini á pallinum upptraðka á einum høgum støði. Og hjá mær er endamálið við eini konsert altíð, at hon skal vera betri enn tann seinasta, sigur Magni. Løgini, áhoyrarnir kunnu gleða seg til, fara at swinga líka frá Buck Owens til Shakin Stevens við steelgittara, violin og øllum, sum hartil hoyrir. Sum eitt eyka krydd verða eisini ein røð av gospel løgum at hoyra, umframt at Magni fer at syngja eina nýggja duett, sum hann ikki vil avdúka meir um júst nú.



*Country, Gospel og jólaløg - áhoyrarnir kunnu gleða seg til eina smakkroynd av eitt sindur av hvørjum, tá Magni saman við tónleikarum og kórum verða at hoyra í Mentanarhúsinum sunnukvøldið*

### Uppfrískaðir jólasálmar

Seinni í hesum mánaðinum gevur Magni eina nýggja fløgu út við nøkrum av okkara gomlu jólaløgum. Tað sermerkta við útgávuni er, at Magni hevur klætt kendu sálmarnar í ein léttan country búna, sum fellir væl í oyrað og eisini ger tær væl egnaðar at framføra á palli og fáa fólk í rætta jóla- og konserthýri.

– Hendan jólafløgan er ein gamal dreymur hjá mær, og tað hevur verið ótrúliga spennandi at finna hesar sálmarnar fram aftur og fríska teir eitt sindur upp. So eg hopi, at fløgan kann vera við til at hesi sangirnir verða oftari at hoyra, tí tað er stutt sagt synd, at hesin vakri boðskapur liggur goymdur burtur í onkrari sálmabók, sigur Magni, sum nú fyrstu ferð sjálvur fer at framføra nakrar av sangunum sunnukvøldið í Mentanarhúsinum





*Føroyska telduspælið Xplore, sum føroyskir miðnámsskúlanæmingar hava kappast í, verður eisini brúkt í útlondum, og nú skal danskur lærustovnur brúka tað til at gera vart við seg*

# Føroyskt telduspæl jokari í donskum skúlastríði

**Hægri danskur lærustovnur brúkar nú eitt føroyskt telduspæl í eini roynd at gera vart við skúlan. Kappingin millum lærugreinarnar á hægru lærustovnunum er hørð, og nú skal føroyska spælið brúkast sum serligt agn**

TELDUSPÆL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Danmarks Tekniske Universitet (DTU) brúkar nú eitt føroyskt telduspæl fyri at gera vart við seg í kappingini við aðrar hægri lærustovnar og útbúgvingar.

DTU skipar fyrst í desember mánaði fyri eini kapping í spælinum Xplore, sum snýr seg um at finna olju og fáa hana til høldar. Forritið er ment av føroyska felagnum Simprentis og hevur eisini verið brúkt í kappingum her heima.

Nú hava onnur tikið spælið til sín, og DTU heldur, at Xplore er sera væl egnað til teirra átak.

– Vit kenna eina ábyrgd fyri at fáa vísa teimum ungu, hvussu tøknin kann brúkast í samfelagnum. Tá vit fingu at vita um spælið Xplore gjørdu vit av at brúka tað í marknaðarføringini av teimum teknisku vísundaútbúgvingunum, sigur Erling Stenby, professari á DTU, við danska blaðið Børsen.

Og at DTU klárar at gera vart við seg við góðari hjálp frá Xplore, vísir júst greinin í Børsen, sum ger nógv burtur úr átakinum hjá DTU.



*Fólk hjá Cairn Energy í India hava eisini roynt føroyska telduspælið*

### Gevur eina fatan av oljuleiting

Xplore er ein lærusimulatión – eitt telduspæl vildi onkur sagt. Felagið Simprentis eigur øll rættindi til spælið, sum í 2001 og 2002 varð ment saman við lýsingafyritøkuni Sansum og italska oljufelagnum Eni. Eisini Oljumálaráðið hevur latið pengar til menningina av spælinum úr puljuni til førleikamenning.

– Endamálið við hesum spælinum er at geva fólki og her ikki minst teimum, sum eru undir útbúgving ella arbeiða í vinnuni, eina fatan av, hvat oljuleiting er fyri nakað. Tá tú hevur luttikið í Xplore í ein dag ella eina viku hevur tú eina betri fatan av, hvat oljuleiting er fyri nakað, sigur Ólavur Ellefsen, stjóri á Simprentis.

Hann hevur verið á onkrari oljumessu fyri at vísa telduspælið fram, og í næstu viku verður Xplore við á oljumessuni Patex í London. Harafturat eru skeið hildin hjá Statoil í Stavanger og hjá Cairn Energy í India. Lesandi í øðrum londum hava eisini roynt at finna olju í cyberspace.

### Árligt tiltak við nógv fleiri fólkum

Danmarks Tekniske Universitet hevur boðið lesandi úr fleiri londum við upp í kappingina, sum verður hildin í næsta mánaði.

250 næmingar úr miðnámsskúlum í Danmark, Grønlandi, Skotlandi, Føroyum, Noregi og Íslandi hava boðað frá luttøku, og tey skulu í tríggjar dagar kappast í smáum bólkum um vinningin, sum er 12.000 krónur.

Áðrenn DTU tók Xplore til sín, royndu professarar og lesandi á DTU spælið, og tey vóru væl nøgd við tað.

– Vit sóu skjótt, at spælið er ikki bara stuttligt og lærurikt – spælið brúkar eisini fleiri ymiskar útbúgvingar. Tøkni og vísund verða drigin saman við búskapi og strategi, og gongdin í spælinum veldst um, hvørjar avgerðir tú tekur á leiðini, sigur professarin Erling Stenby við Børsen.

DTU ætlar, at kappingin í Xplore skal gerast afturvendandi, og tey rokna við, at tað verða nógv fleiri luttakarar við í framtíðini.

## Kommunurnar skulu í lumman

**Mentamálaráðið heldur, at kommunurnar skulu taka størri ábyrgd av mentanartiltøkum í lokaløkinum**

MENTANARSTUÐUL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni hevur lagt ein frágreiðing um mentanarstuðul fyri løgtingið at hava aðalorðaskifti um.

Orsøkin er, at stuðulsøkið er ikki nóg greitt skipað, og landsstýrismaðurin vil tí hoyra sjónarmiðini hjá løgtinginum um hetta. Tað skal síðani brúkast sum grundarlag fyri at gera lógaruppskot.

Eitt av sjónarmiðunum hjá landsstýrismanninum er, at kommunurnar skulu taka størri ábyrgd av mentanartiltøkum.

– Tað er eyðsæð, at lækkar landskassastuðulin, samstundis sum verandi virksemi á økjunum annars skal varðveitast, skal kommunali parturin hækka samsvarandi, ella aðrar inntøkukeldur fáast til vega, stendur at lesa í frágreiðingini hjá landsstýrismanninum.

Víðari verður sagt:

– Mentamálaráðið metir, at tíðin er búgvin at umhugsa, hvørt tað ikki er skilabest, at kommunurnar átaka sær størri fíggjarliga ábyrgd av tí mentanartilboði, sum stendur borgaranum í lokalsamfelagnum í boði.

## Føroyingar blanda seg uppí

Í døgunum frá 23. til 25. november verður stór oljumessa í London. Messan verður rópt Patex og er bæði ein ráðstevna og framsýning.

Hetta er níggjundu ferð, at hendan oljumessan verður hildin, og nú sæst tað eisini aftur, at føroyingar hava blandað seg upp í hesa vinnu.

Millum tey mongu oljufeløgini, sum hava stuðlað messuni, er føroyska oljufelagið Faroe Petroleum. Og selskapið er fínt, tí eisini feløg sum Statoil, BP, Gaz de France, Nippon Oil og ChevronTexaco stuðla Patex.

**ek**